


*Verandi fiskivinnuskipan hevur havt við sær, at skuldin hjá heimaflotanum nærum tvívaldaðist frá 2000 til 2007, vísir Búskaparráðið á í síni frágreiðing. Tí má skipanin broytast, heldur ráðið*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

og fót, og teir hava eisini í mong ár havt síni umboð sitandi í sessinum, har kvoturnar verða býttar út og fiskivinnupolitikkurin annars lagdur til rættis. Í øðrum flokkum er hugburðurin til skipanina ein annar. Bæði Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin, Miðflokkurin, ein partur av Sjálvstýrisflokkinum og ein partur av Sambandsflokkinum hava sagt seg vera fyri, at ein tilfeingisbúð verður sett á stovn, so umsitingin av fiskatilfeinginum kann gerast fræls og gjøgnumskygd og haraftrat lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg. Enn hava hesir flokkar ikki megnað ella torað at gjøgnumført hesa nýggju skipan uttan um Fólkaflokkin, men tað vil Búskaparráðið hava, at teir gera.

## Alt á uppboðssølu

Í seinastu frágreiðing síni sigur Búskaparráðið, at frægasta loysnin hjá tí almenna at luta út fiskirættindi hevði verið at selt tey á almennari uppboðssølu. Hetta hevði skundað undir tillagingar í flotanum eftir marknaðarligum treytum og gjørt, at mest lønandi og effektivu fyritøkurnar fingu hendur á fiskirættindunum. Um loyvir vórðu seld regluliga á eini uppboðssølu, sum vóru galdandi í styttri tíð enn í verandi skipan, hevði vinnan sloppið undan at tikið stóran váða á seg fyri at fáa hendur á rættindunum, eins og talan er um nú, sigur Búskaparráðið. Ein tílík skipan hevði eisini gjørt tað møguligt hjá landskassanum og samfelagnum, sum eiga tilfeingið, at fingið lut í tilfeingisrentuni, sigur ráðið, ið heldur, at byrjast skal beinanvegin at royna nýggju skipanina. Ráðið skrivar:

»Ein møguleiki er, at tað almenna byrjar við at luta út rættindi eftir eini skipan við uppboðssølu til nýggjan fiskiskap, sum tekur seg upp í føroyskum sjógvi ella aðrastaðni í millumlandasamstarvi. Dømi um tílíkan fiskiskap eru makrelfiskiskapurin í føroyskum sjógvi og toskafiskiskapurin á Flemish Cap. Skotið verður upp, at rættindi til tílíkan fiskiskap, sum ikki eru givin við søguligum rættindum, verða seld eftir eini skipan við uppboðssølu. Hetta hevði tryggjað, at landskassin sum umboð fyri eigaran, Føroya fólk, hevði fingið lut í tilfeingisrentuni. Tað skilabesta fyri fiskivinnuna er, at hon virkar eftir marknaðarligum treytum eins og aðrar vinnur. Tí verður skotið upp, at allur beinleiðis ella óbeinleiðis stuðul til fiskivinnuna verður strikaður, og at forðingar fyri fríari kapping og tillaging eisini verða strikaðar.«

Ongin ivi er um, at Búskaparráðið her mælir til eina liberalistiska skipan heldur enn eina skipan, sum minnir um gomlu feudalskipanina, har ávísir aktørar í politisku skipanini og í fiskivinnuni hanga saman í tvívegis trúskaparbondum. Gongdin í fiskivinnuni síðstu árini vísir, at karmarnir um fiskivinnuna eru ikki av tílíkum slag, at fiskivinnan gevur størst møguligt avkast, sigur Búskapparráðið. Størsti trupulleikin fyri fiskivinnuna er, at hon er ikki lívfrøðiliga burðardygg. Ein fyritreyt fyri at fáa størst møguligt avkast í vinnuni er júst, at hon er lívfrøðiliga burðardygg. Ráðið heldur, at har loyvt er at fiska, er í veruleikanum frítt fiskarí í dag, tvs. at aktørarnir í fiskivinnuni kunnu gera, sum teir vilja, tí politiska skipanin loyvir tí. Stovnarnir verða av hesi orsøk niðurpíndir, og flotin fær ikki konsoliderað og endurnýggjað seg.

## Óhefta umsiting

Búskaparráðið staðfestir, at royndirnar úr verandi skipan, har politiska skipanin ásetir fiskidagarnar, vísa týðiliga, at politiska skipanin er ikki før fyri at taka atlit til langtíðarstøðuna hjá fiskastovnunum og fiskivinnuni sum heild. Freistingin hjá politisku skipanini at taka stutttíðaratlit er stór, m.a. tí løgtingsval eru við jøvnum millumbilum. T.d. er trupult hjá politisku skipanini at skerja dagatalið í fiskidagaskipanini munandi, hóast hetta lívfrøðiliga er tað skilabesta at gera. Ein betri skipan, staðfestir ráðið, hevði verið, at ein óheftur stovnur fekk ábyrgdina av at áseta eitt mest loyvda dagatal fyri fiskiskapin undir Føroyum eftir lívfrøðiligum treytum. Hesin stovnur kundi so verið sami stovnur, sum hevði ábyrgdina av at skipa eina uppboðssølu við fiskirættindum.

Ráðið ásannar, at tað verður ikki lætt at fáa fiskivinnuna at góðtaka hesa skipanina, og kanska er tað ikki so løgið, tí undir verandi skipan eru politikararnir ofta vegurin fram at tilfeinginum í havinum. Ráðið nevnir eisini tann veruleika, at fiskiloyvir hava ment seg til frítt umsetilig virðir, ið ofta hava nógv størri virði enn fiskiførini, tey eru knýtt at. Hendan skipan hevur havt við sær, at skuldin hjá heimaflotanum nærum tvívaldaðist frá 2000 til 2007. Skipanin er hvørki heppin fyri vinnuna ella fíggingarstovnarnar, ið taka óneyðuga stóran váða á seg. Betri hevði verið, um fiskirættindi høvdu verið seld regluliga á eini uppboðssølu, sigur ráðið, tí sum støðan er nú, verður ov nógv fiskað. Tað trýstir stovnarnar og dregur tilfeingisrentuna úr vinnuni.

Her stendur so málið um tilfeingisumsitinigina hjá Fiskimálaráðanum og løgtinginum. Um gomlu feudalskipanina verður annars í søgubókum sagt, at hon upployst so líðandi, tá stórmenninir orsakað av friðariligari tíðum ikki longur høvdu tørv á at vera trúgvir ímóti kongi. Leingi vóru bøndurnir tó prísgivnir undir góðseigarunum, men við fronsku kollveltingini, sum loysti teir úr haftinum, og tankunum um ein kapitalistiskan búskap, har tann besti yvirlivdi eftir marknaðarligum treytum, upployst feudalskipanin og við henni trúskaparbondini og skyldurnar millum ymsu løgini í henni. Fólkaræði, gjøgnumskygni og rætturin til at smíða sær eydnuna góða eftir liberalistiskari hugsan vunnu á gomlu framíhjárættindunum, og burtur úr hesum skaptist stórur framburður og nýskapan.